# Fundarfrágreiðing til HSF-limafund mikudagin 31. mai 2023

Luttakandi: Jógvan Emil Nielsen, Durita Thomsen, og Birgir Kass fyri Starvsnevndina. Thomas Juul Thomsen fyri Dómaranevndina. Ári Rouch, Mark Lausen-Marcher, Hallur Danielsen og Hans Jón Thomsen fyri umsitingina. Hans Andreas Dahl og Rúni Mohr fyri EB, Høgni Juul fyri VÍF, Barbara Høj fyri Neistan, Rúni Rasmussen fyri StÍF, Anja Weyhe fyri KÍF, Durita Ljósstein fyri Stjørnuna, Salua Manai og Maibritt Johannesen fyri Kyndil, Djóni Gaard Joensen fyri H71. Ikki umboðaði ÍA, SÍF/Søljan, VB og Team Klaksvík.

**1.0 Live.hsf.fo**
Hallur Danielsen legði fram og vísti á gongdina seinasta árið. Víst var á, at arbeitt verður við at menna stroymingarpallin á ymsar hættir, við m.a. grafikki og hagtølum. Tað var viðmerkt, at stroymingin ofta byrjar og endar ov knapt rundan um dystirnar. At hendan t.d. kundi byrja 5 minuttir fyri dyst og enda 5 eftir dyst, soleiðis at rómur og fagnaður betri kann sýnast.

**1.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur og verður arbeitt fram ímóti at stroyming altíð skal byrja 5 min. áðrenn og koyra til 5 min. eftir dyst.

**2.0 Álmanakkin 2023/24**
Ári Rouch greiddi frá bygnaðinum í álmanakkanum og hvussu hesin skal lesast. Víst var á, at vikuskftið 13. – 14. januar 2024 verða eingir dystir í hondbólti, tá A-landsliðið skal spæla EM í Berlin og at nógvir hondbóltsáhugaðir føroyingar væntast at fara at hyggja. Tað varð viðmerkt, hvørt tað var møguliga at U10 og U12 ikki enda kappingarárið sami vikuskifti.

**2.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur og verður miðja eftir at U10 og U12 ikki enda sama vikuskifti.

**3.0 Eftirmeting av kappingarleisti í fremstu deildum og U10**
Ári Rouch legði fram. Í eftirmetingini hjá kappingarnevndini og umsitingini var semja um, at nýggji kappingarleisturin í fremstu deildunum hevur eydnast sera væl. Semja var eisini millum feløgini, at leisturin var góður. Tað varð viðmerkt, hvørt tað var rætt at spæla 5 finalur, ella um tríggjar ikki vóru nokk. Hetta hevur verið umrøtt áður á limafundi og hevur eingin greið niðurstøða ella semja verið um hetta. Víst var á, at um feløgini ynskja at minka um talið av finalum, so skal ein skrivlig áheitan frá feløgunum um hetta takast upp á einum komandi limafundi.

Afturmeldingarnar til nýggja kappingarleistin hjá U10 hava eisini verið sera góðar og var ynski um at halda áfram við hesum. Fleiri feløg settu fram ynski, at tey eisini vildu hava hendan leistin til U12.

**3.1 Niðurstøðua**
Feløgini góvu kunningini gætur. Um feløgini ynskja tríggjar finalur hjá teimum vasknu, skal ein ítøkilig, skrivlig áheitan koma frá feløgunum til hetta. Umsitingin hjá HSF sendir til hoyringar, viðvíkjandi einari møguligari broyting av U12 leistinum, soleiðis at hesin verður eins og U10.

**4.0 Uppskot til samtyktar viðv. yngstu aldursbólkunum**
Ári Rouch legði fram uppskot til samtyktar, at broyta aldursbýtið hjá U8 og U10, soleiðis at hetta nú fer at

eita U7, U8, U9 og U10.

*U7, 4 ella 5 á vøllinum, tvørvøllur (kappingar sum vit kenna frá U8 í dag)*
*U8, 5 á vøllinum, tvørvøllur (kappingar sum vit kenna frá U8 í dag)*
*U9, 6 vøllinum, stuttvøllur (kappingar sum vit kenna frá u10 í dag, eingin steypakapping)*
*U10, 6 á vøllinum, heilan vøll (kappingar sum vit kenna frá U10 í dag, við steypakapping)*
*U12, 7 á vøllinum, heilur vøllur (sum vit kenna í dag)*

**4.1 Niðurstøða**
Uppskotið var samtykt.

**5.0 Uppskot til samtyktar, broyting av kappingarreglu 1.9 og 2.7**
Ári Rouch legði fram uppskot um broytingar av tveimum ásetingum í kappingarreglunum. Kappingarárið er longt, og tískil var neyðugt at broyta ásetingina í 1.9. Eisini kann talið av liðum í næstbestu deildunum fara uppum mest loyvda og var tískil neyðugt at broyta ásetingina í 2.7.

*1.9 Kappingarárið er frá 1. mai til 30. apríl*
(Verður broytt til frá 1. juni til 31. mai)

*2.7 Tað kunnu vera upp til 8 lið í 1. mans- og kvinnudeildini í hondbólti*
(Talið verður hækkað til 11. Fer tað uppá 12 lið, fer deildin í tvey til 1. deild og 2. deild)

**5.1 Niðurstøða**
Uppskotið var samtykt.

**6.0 Dómarasamsýningar í endaspælinum + atgongumerkjaprísir**
Dómaranevndin legði fram uppskot, at allir dystir í FM-endaspælinum skulu geva dubultan takst, t.v.s. at hetta verður víðka til at umfaya fjórðingsfinalur og bronudystir eisini. Nógvir áskoðarar vóru til bæði fjórðingsfinalurnar og bronsudystirnir og uppliva dómararnir eitt størri trýst til hesar dystir og mugu teir fyrireika seg betri. Feløgini umrøddu uppskotið og var gjørt at at samtykkja hetta, men at samstundis geva feløgunum møguleikan at taka 100 kr. fyri atgongumerki til hesar dystir

**6.1 Niðurstøða**
Uppskotið var samtykt og var samstundis samtykt, at feløgini kunnu taka 100 kr. fyri vaksin í atgongumerkjaprísi til fjórðingsfinalurnar í landskappingini

**7.0 Matvanar í hallunum**
HSF hevði á skrá ein stuttan fyrlestur og umrøðu av matvanum í hallunum við Snorra Paturson úr Fólkaheilsuráðnum. Tað var umrøtt í hvønn mun feløgini í størri mun skulu ganga á odda við betri matvanum í hallunum og tí sum verður selt í kioskunum.

**7.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur og sýndu jaligan hugburð til kjakið.

**Fundarskrivari:**
Ári Rouch